## Brúka landnyrðingsleiðina



Suez-veitin fær nú kapping frá landnyrðingsleiðini, tí nú ber til at sigla millum Atlantshavið og Kyrrahavið við at fara norður um Russland . Í síðstu viku fóru tvey farmaskip hjá týska reiðarínum Beluga hendanvegin, og danska reiðaríið Torm ætlar sær eisini at brúka ta nýggju farleiðina. Niels B. Knudsen hjá Torm sigur við Ritzau, at tey ætla at senda tað fyrsta skipið ígjøgnum landnyrðingsleiðina næsta ár. Har er nógv at spara, sigur hann, tí landnyrðingsleiðin ger siglingina úr Evropa til Asia 4.000 fjórðingar styttri. Tað ger eisini CO2-útlátið hjá skipunum munandi minni enn nú.

## Ósemja um Beaufort-havið

Kanadiumenn eru í øðini um, at USA hevur bannað allari fiskiveiði í Beaufort-havinum, sum er úti fyri markinum norðanfyri millum Kanada og Alaska. Málið hevur vakt so stóran ans í Kanada, og eftir kravi frá politikarunum skal Stephen Harper, forsætisráðharri, á fund við Barack Obama, forseta um amerikanska veiðibannið. USA og Kanada hava leingi keglast um ræðisrættin til Beaufort-havið, og londini hava fyrr sagt, at málið skal loysast við samráðingum. Tí eru kandiumenn í øðini um, at USA tekur egnar avgerðir uttan at spyrja seg fyri fyrst.

# Funnu tveir fløskupostar á somu leið



*Lítli Villiam, sum bert er eitt ára gamal, skilir neyvan, hvat ein fløskupostur er, men í gjár fann mamma hansara tveir slíkar, sum kastaðir eru á sjómannadegnum í Klaksvík*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

**Ein fastur táttur í sambandi við sjómannadagin í Klaksvík er, at børn kasta fløskupostar. Í gjár vórðu tveir av hesum funnir aftur í fjøruni í Rituvík**

FLØSKUPOSTUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mong hava hvørki skrivað ella funnið ein fløskupost.

Men í gjár, tá ein lítil familja, sum býr á Nesi, var farin ein túr oman á støðna í Rituvík at fanga kombikk, funnu tey ikki færri enn tveir fløskupostar – báðar um somu leið.

Báðir vóru kastaðir í Klaksvík í sambandi við sjómannadagin og vórðu nú riknir á land í Rituvík.

Á myndini síggja vit lítla Villiam, sum hevur annað brævið og aðra fløskuna í hondini, sum mamma hansara, Dinna Tindalíð, fann hetta kvøldið í fjøruni í Rituvík.

Annar fløskuposturin er skrivaður á føroyskum, hin á enskum, og tað eru tvey børn, ávikavist úr Klaksvík og úr Hoyvík, sum hava lagt navn til.

Á brævpappírinum stendur, at tann, sum finnur fløskupostin, skal senda hann til deildina hjá Eik í Klaksvík.

Og nú hava so Villiam og Dinna tveir slíkar fløskupostar at senda til Klaksvíkar.

Sosialurin ringdi gjáramorgunin til deildina hjá Eik í Klaksvík fyri at fregnast, um fleiri fløskupostar longu eru funnir og komnir Eik í hendi.

Men maðurin, vit skuldu tosa við, var upptikin hesa løtu og skuldi ringja aftur til okkara.

Vit fara í einum øðrum blaði at fylgja søguni upp og fara at siga frá, hvussu nógvir fløskupostar koma aftur av teimum, sum børn kastaðu á sjómannadegnum í Klaksvík.

# Havhestatíðin er av

FUGLAVEIÐA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nú hann sigur veksandi vind, má roknast við, at havhestatíðin á hesum sinni er av. Ikki tí, at ov langt er útliðið, men fuglurin er helst farin á sjógv rímiliga tíðliga, og tí má roknast við, at lítið og einki situr eftir í bjørgunum, tá fríski vindurin, hann nú sigur, hasar av aftur.

Nógvur fuglur er tikin á sjónum í heyst, og dúgliga hevur verið roynt at selja, bæði á marknaðarplássinum í Vágsbotni og aðrastaðni, har møguleikar eru at sleppa av við nakrar fuglar.

Í onkrum bygdum í Eysturoy hava børn eisini gingið húsagongd og hava spurt, um fólk ynskja at keypa havhest.

Hugsandi er, at marknaðurin í løtuni er mettaður, men undarligt skal vera, um menn, sum hava tikið havhest í heyst og kanska eiga nakrar liggjandi í salti, ikki sleppa av við nakrar fuglar aftrat, sum tíðir gongur og fólk fara at munga eftir einum leskiligum bita aftrat.



*Nógvur havhestur er tikin í heyst, og dúgliga hevur verið roynt at selja*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Ortodoksur jødi í Miðlahúsinum



*Motti Isaak er ortodoksur jødi, og málið hjá honum er at fáa politikarar at taka Guðs orð í álvara, sum hann tekur til*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Eg trúgvi, at Guð hevur lovað okkum landið – og ikki bert ein part av landinum, sigur ortodoksi jødin, Motti Isaak, sum fer at greiða frá í Miðlahúsinum í Vágsbotni í kvøld**

TILTAK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í kvøld klokkan 19 fer Motti Isaak at greiða frá í Miðlahúsinum í Vágsbotni. Hann fer eitt nú at tosa um ísraelsku búsetingarnar á Vestara Áarbakka og onnur viðurskifti í hesum sambandi.

Motti er føddur í Keypmannahavn í 1952. Hann fór til Ísraels sum 16 ára gamal eftir seks daga krígg-ið í 1967, tá nógvir jødar fóru "heim" at byggja landið upp, sum sagt verður.

Hann er ortodoksur jødi sum merkir, at hann trýr upp á Gamla Testamenti og lyftini til jødiska fólkið.

Motti trýr, at Guð hevur lovað jødunum landið – og ikki bert ein part av landinum.

### Í herinum

Motti Isaak hevur verið í ísraelska herinum, og hann hevur alla tíðina tikið lut í rørsluni fyri búsetingum, har hann sjálvur eisini býr.

Ferðirnar hjá honum kring um heimin at tala fyri ísraelsku búsetingunum eru nógvar á hvørjum ári, og hann fylgir væl við øllum tí, sum politiskt rørir seg við atliti til Ísrael.

Málið hjá Motti Isaak er at ávirka politikarar kring um heimin til at taka Guðs orð í álvara, sum hann sjálvur málber seg.

Í kvøld klokkan 19 verður hann so í Miðlahúsinum í Vágsbotni, og hann er eisini fúsur at svara møguligum spurningum.